# Jólakalendarin 2006

## Trøllapætur gleðir seg



– Ja góði, nú skulu vit fara at hyggja í jólakalendanum og so skal omma siga tær søguna aftaná.

Trølla Pætur sat og ótolnaðist á gamla træbeinkinum. Hann stardi inn í logan frá kertuljósinum, sum spakuliga brann niður ímóti eitttalinum. Enn einaferð fór hondin niðurí kakuílatið og hann fekk sær eina afturat. Ummm, hann elskaði nýbakaðar trøllatossar við krákuberjusúltutoyi! Men tær seinastu smákøkurnar og allar molarnar skuldi omman eiga. Tað var jú hon sum hevði bakað og gjørt alt so hugnaligt í lítla og fjálga seyðahúsinum, sum var teirra góða trøllaheim...

Á bróstinum inni í køkinum hekk skeltið "Hvat er eitt heim uttan trøllaommu" og uppiyvir skríninum, sum nú var á tremum við gávum og góðgæti, hekk jólakalendarin 2006.

– OMMA, eg eri so spentur. Sleppi eg at lata upp nú?

– Ja, góði. Allarbesti hjá ommuni. Vita nú hvat spennandi er goymir seg aftanfyri lúkuna.

Trølla Pætur var skjótur upp úr bonkinum og prikaði fremstafingur inn undir kantin á talinum.

– Omma, kom og hygg. Ein fínur bilur. Ein sovorðnan bil ynski eg mær til jólar!

– Ja, góði, nú fáa vit at síggja. Í dag skulu øll hava fínar bilar, menn, konir, trøll, ommir og børn. Tað er næstan bara Erling politistur og Jógvan sum súkla. Øðrvísi var tá omma var barn. Tað er sooo langt síðani at sjálvt jólamenn vóru ikki vanligir í Føroya tá. Men veitst tú hvat jólamaðurin á Stórafjalli sigur?

– Nei, fortel omma. Hvat sigur jólamaðurin?

Trøllaomman streyk blídliga Trøllapæturin oman eftir teimum mongu kjálkunum og byrjaði at fortelja.

»Tað eru ikki allir jólmenn sum orka so væl longur. Og Hvítaskegg, sum í nógv ár hevur gingið á Stórafjalli, sigur at hann umhugsar at flyta til okkurt annað land, har børnini ikki eiga so nógv og har tey eru glaðari fyri gávurnar. Seinastu jól fingu fleiri túsund børn í Føroyum bilar í jólagávu. Øll møgulig sløg av bilum. Legobilar, brandbilar, rasarabilar, lastbilar, sjúkrabilar, oljubilar, kranabilar og politibilar. Men næstan allir bilarnir eru longu brotnaðir. Og børnini ansa ikki so væl eftir leikunum longur. Tá omma var lítil visti eg ikki hvat bilur var fyri nakað"

Trøllapætur hugdi tortrúgvin uppá ommuna, sum ikki hevði nakað koyrikort, men sum kortini dugdi bæði at koyra motúrsúklu og lastbil. At hugsa sær, at omman einaferð hevði verið lítil og at ongir bilar vóru í Føroyum tá. Hann ætlaði at siga nakað, men í somu løtu helt omman fram at siga frá...

"Tað vóru nógv trøll sum ræddust, og rýmdu langt niðan í fjøllini, tá tann fyrsti bilurin varð lossaður í land og fór buldrandi eftir smala vegnum. Men børnini hildu tað verða óføra stuttligt og runnu kát aftaná bilinum. Nú eru tað bara hundar sum orka at renna eftir bilum. Og eitt veit eg, Trøllapætur, góði.... Í dag koyra fólk so nógv í bili, at tey missa gongulagið og gloyma smakkin av frískari føroyskari fjallaluft....«

– Omma, minnist tú hinaferð tú lánti ein bil sum eksploderaði á Oyggjavegnum. Tað var eitt verri skili. Og eg mundi brent mær halan.

– Oy oy góði Trøllapætur. Ja, ikki allir bilar eru at spæla við. Men hvør veit, kanska ført tú ein nýggjan og fínan í jólagávu. Góða nátt. Ein dagur verður aftur í morgin.













Minst til í dag...



Minst til at skifta battaríini
á roykvarnaranum í dag

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari